# Ovfarin av støðinum



- Tað er eisini áhugavert hjá bretum at lesa um fótbólt í øðrum londum. Eisini teimum smáu londunum, heldur Jim Hurren

Mynd: Álvur Haraldsen

**Enski tíðindamaðurin, Jim Hurren, er í hesum døgum á Føroyavitjan. Greinar um føroyskan fótbólt og føroyska leikvøllir eru endamálið við ferðini hjá fyrikomandi bretanum**

FÓTBÓLTSPRÁT
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tað er ikki gerandiskostur, at útlendingar leita sær til Føroya á fótbóltsferð, men í hesum døgum er bretin Jim Hurren á vitjan á klettunum í hesum ørindum. Jim Hurren, ið er tíðindamaður, kom til Føroya fyri góðari viku síðani, og hann skal verða her í nærum tvær vikur afturat.

### Fekk áhuga fyri Føroyum av tilvild

Tað er ikki tí at Jim Hurren, ið vit fingu eitt prát við fyrr í vikuni, hevur fylgt við í føroyskum fótbólti í so langa tíð, at hann nú hevur lagt leiðina hagar. Tvørturímóti greiður fryntligi bretin frá, at tað var mest sum av tilvild, at hann yvirhøvur kom fram á nakrar upplýsingar um Føroyar og føroyskan fótbólt seinasta heyst.

Jim Hurren, ið er free-lance tíðindamaður, skrivar fast nakrar greinar fyri eitt enskt tíðarrit, ið kallast Stadium and Arena Management. Hetta er rættuliga sermerkt blað, tí tað inniheldur næstan bara tilfar og greinar um leikvøllir og áskoðaraviðurskiftir við meira. Av somu orsøk hevur hetta stóran áhuga hjá Jim, og eitt kvøldið hann sat framman fyri telduni og leitaði eftir myndum av ymiskum fótbóltsvøllum á alnetinum, kom hann fram á eina serliga mynd. Á myndini sá Jim ein fótbóltsvøll, sum sá út til at liggja mitt úti í sjónum. Hann gjørdist forvitin eftir at finna út av, hvar hesin vøllurin var, og skjótt fann hann fram til, at talan var um vøllin í Miðvági. Hetta var so byrjanin til áhugan fyri Føroyum og føroyskum fótbólti, greiðir Jim Hurren frá.

### Føroyskur fótbóltur er eisini áhugaverdur fyri bretar

Millum føroyingar er áhugin fyri enskum fótbólti ovurhonds stórur, og tí hevði tað neyvan vakt ans, um ein føroyskur tíðindamaður fór til Onglands at gera ymiskt tilfar um enskan fótbólt. Men at ein enskur tíðindamaður kemur til Føroya at skriva greinar um føroyskan fótbólt, sum bretar skulu lesa, tykist eitt sindur øvugt. Men Jim Hurren heldur so ikki, at talan er um spill av tíð. Hann sigur, at hóast tað kanska ljóðar eitt sindur løgið, so er tað eisini áhugavert hjá bretum at lesa um fótbólt í øðrum londum. Eisini teimum smáu.

Á ferð síni í Føroyum fer Jim Hurren fyrst og fremst at skriva greinar til tíðarritið, Stadium and Arena Management, men hann fer allarhelst eisini at skriva fyri tey meiri kendu fótbóltsbløðini "4-4-2" og "When Saturday comes". Greinarnar til hesi bæði bløð fara, í mun til áðurnevnda tíðarrit, at snúgva seg um sjálvan fótbóltin í Føroyum og føroyskar leikarar.

Sum dømi um áhugan fyri Føroyum nevnir Jim Hurren, at so skjótt hann nevndi fyri blaðstjóranum á Stadium Arena and Management, at hann kundi hugsað sær at farið til Føroya at skriva um føroyska fótbóltsheimin, fekk hann stuðul frá hesum til at fara avstað.

### Er ovfarin av høga støðinum

Síðani bretski tíðindamaðurin kom til Føroya, hevur hann verið til fleiri fótbóltsdystir. Millum annað var hann farna vikuskifti og hugdi at dystinum millum HB og VB í 1. deild, og millum AB og Royn í 2. deild. Eisini nýtti hann størsta partin av næst seinasta vikuskifti í Gundadali, har hann hugdi at teimum mongu dystunum, ið har eru millum ymisk ungdómslið úr øllum landinum. Jim Hurren sigur, at hann er púra ovfarin av, hvussu høgt støðið er á fótbóltin í Føroyum, og serliga heldur hann støðið á ungdómsliðunum verða serstakliga høgt í mun til fólkatalið í Føroyum.

Hóast hann bert hevur havt áhuga fyri føroyskum fótbólti í gott og væl eitt hálvt ár, so hevur Jim Hurren longu fingið eitt gott innlit í fótbóltsheimin her á landi. Undir samrøðuni nevnir hann ofta fleiri leikarar við navni, og millum annað vísti hann seg at hava rættuliga stóran kunnleika um Toda Jónsson.

Ein annar leikari, ið Jim Hurren kemur inn á, er ungi Ingi Højsted, sum er sáttmálabundin við enska stórfelagið Arsenal, sum teimum flestu kunnugt júst hevur vunnið enska meistaraheitið uttan at tapa ein dyst alt kappingarárið. Jim Hurren greiðir frá, at hann herfyri vendi sær til Arsenal, í vón um at hann kundi fáa eina samrøðu við Inga, men hetta var ógjørligt, tí boðini úr enska felagnum vóru, at eingin sleppur at tosa við okkara ungdómsleikarar.

### Ein blanding av arbeiði og ítrivi

Tað er ikki bert av arbeiðsorsøkum, at Jim Hurren hevur leitað sær hagar. Hann sigur, at um hann bert var her í arbeiðsørindum, so steðgaði hann einans tríggjar dagar ístaðin fyri tríggjar vikur. Men av tí at ferðin er minst líka nógv eitt privat ítriv, er steðgurin langur. - Mær hevur altíð dámt væl at vitja óvanlig støð, sigur bretski tíðindamaðurin.

Meðan hann steðgar her á klettunum, hevur Jim Hurren leigað sær ein bil, og við hesum roynir hann at koma so nógv runt á oyggjunum sum gjørligt. Hósdagin var hann til dyst í Gundadali millum B36 og NSÍ, og eftir dystin gjørdi hann eina samrøðu við Jens Martin Knudsen.

### Útbúgvin tónleikari

Hóast Jim Hurren arbeiðir sum free-lance tíðindamaður, so hevur hann eina heilt aðra útbúgving. Fyrikomandi maðurin úr Northampton er nevnliga útbúgvin á hægri lærustovni sum klassiskur tónleikari við percussions sum sínari sergrein. Hann er eisini framvegis virkin á hesum øki, og millum annað starvast hann okkurt um tríggjar mánaðir um árið sum tónleikari hjá the English National Ballet.

Tann 3. juni fer Jim Hurren av aftur landinum, men er tað onkur, sum vil seta seg í samband við hann og møguliga greiða honum frá um okkurt áhugavert í føroyska fótbóltsheiminum, so ber til at senda honum ein teldupost á jimhurren@postmaster.co.uk, og so svarar hann fegin.



Tekniski Skúlin Klaksvík

## Undirvísari

Søkt verður eftir yrkislærara til útbúgvingar innan el- og maskinøkið, at undirvísa handverkslærlingum, SIT- og HT-næmingum.

**Førleiki**
Ynskiligt er, at umsøkjarin er útbúgvin innan maskin- og el-økið. Maskinmeistaraprógv og arbeiði sum el-innleggjari í minst 2 ár er ein fyrimunur.

**Setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Tekniska Lærarafelag, lønartalva I og II.

Tikið verður við starvinum 9. august 2004

**Spurningar**
Áhugaði kunnu fáa meir at vita við at venda sær til Rúna Heinesen, skúlastjóra

**Freist**
Umsókn skal sendast skúlanum í seinasta lagi 9. juni.

Umsókn sendast:

**Tekniski skúlin í Klaksvík**
Postrúm 20
FO-700 Klaksvík

Barnagarðurin á Konmansmýru

## Pedagogar

**Vit søkja eftir tveimum pedagogum**
Ein pedagog 30 tímar og ein pedagog 35 tímar um vikuna frá 1. juli ella 1. august 2004.
Søkir ongin pedagogur verða hjálparfólk sett.

**Vit eru** ein glaður og humoristiskur starvsfólkabólkur,
Stovnurin er ein sjálvsognarstovnur. Børnini eru í aldrinum 3-7 ár.
Á hvørjari stovu eru 17 børn. Tey 6-7 ára gomlu eru í stovu fyri seg.

**Vit ynskja at umsøkjarin:**
- Hevur góð samstarvsevni
- Kann arbeiða sjálvstøðugt
- Er røkin, nærlagdur og álítandi
- Nýhugsandi og ígongdsetandi

Løn sambart sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið. Byrjunarstig 10.

**Er hetta tú**, so send okkum eina umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum til okkum áðrenn 9. juni 2004.

Meiri fæst at vita við at ringja til okkum og tosa við leiðaran, tlf. 317878.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmæli skal verða okkum í hendi seinast 24. mai 2004.

**Barnagarðurin á Konmansmýru**

## Lærlingur

til Køksmiðstøðina í Tórshavn

Køksmiðstøðin søkir eftir lærlingi til køks- og hvítvøruhandilin vegna víðkað virksemi at byrja beinavegin.

Køksmiðstøðin er fremst innan sølu av køkum, baðirúmum, klædnaskápum og hvítvørum.

Vit bjóða tær eitt áhugavert lærupláss í einum spennandi og fjøllbroyttum umhvørvi.

Ert tú ágrýrtin og hevur hug og hegni til at veita kundum okkara góða tænastu?

Tað er ein treyt, at tú hevur FHS ella HH.

Skrivlig umsókn skal verða okkum í hendi innan 1. juni 2004 og skal sendast til.

**Køksmiðstøðin, Postboks 1201, 110 Tórshavn**

*Nærri upplýsingar um læruplássið fáast frá Vinjard Johansen á tel 31 49 49*

**Køksmiðstøðin**
Á Hálsi • Tórshavn • Tel. 31 49 49 • Fax 31 13 30

Magnus Heinasonargøta 23. 1,
Postboks 205, FO-110 Tórshavn
Tel (+298) 31 89 03, Fart. (+298) 21 89 03
Fax (+298) 31 87 03

bókhaldsvirkið RannTeld

Bókhald - Skuldararøkt - Ráðgeving - Skattauppgerð

### Matstova til sølu

Vegna viðskiftafólk selja vit vælrikna og vælvitjaða matstovu í leigaðum hølum í miðbýnum í Tórshavn. Í matstovuni er alt nýmótans innbúgv og útbúnaður og verður hon seld um nóg høgt boð fæst.

Seriøs áhugaði kunnu venda sær til okkum á telefon 31 89 03 ella 21 89 03, telefax 31 87 03 ella t-post: rannteld@post.olivant.fo

RannTeld er eitt bókhaldsvirki, sum røkir skrivstovu-, bókhalds- og aðrar uppgávur fyri einstaklingavirkir, smápartafeløg og partafeløg. Eftirspurningurin eftir teimum tænastum RannTeld veitir er støðugt vaksandi, samstundis sum tænastuumráðið eisini økist í hvørjum. RannTeld byrjaði sítt virksemi í 1991 við einum starvsfólki. Í dag hevur RannTeld fýra fólk í starvi

Gallarí Jinx

Anja Hentze

Málningaframsýning í mai

tel 317101 • jinx@jinx.fo

Sosialurin 341800

## Frá S & K felagnum

S & K felagið bjóðar til kunnandi fund á Restaurant Muntra í Fuglafirði týsdagin 25. mai 2004 kl. 20.30

Skrá:
- Kunning um S & K felagið
- Lønarsáttmálan
- Eftirlønargrunnin
- Lívstryggingarskipanina

eisini ber til at seta nevndini fyrispurningar

Limir felagsins og annars øll áhugaði eru vælkomin.

Við á fundinum verður nevndin hjá S & K felagnum

Felagið bjóðar kaffi og te

Vinarliga
**S&K-felagið**

Sosialurin 341800

**SKJÓTTGANGANDI BAY-LINER 2255 SUNBRIDGE**
...bíliga til sølu - fyri hægstbjóðandi



**Ringið og hoyri nærri**
**TEL 77 00 86**

Sosialurin
Lesið Sosialin
-tað loysir seg!